# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 23.10.2023 kl. 16.30

| | |
|---|---|
| Á fundi: | Janus Thomsen |
| | Niels Olaf Eyvindsson |
| | Thorstein Thomsen |
| | Martin í Nesi |
| | Poul Laust Christiansen |
| Ikki møtt: | Ronni Hammer |
| | Eir J. Norðberg |
| Skrivari: | Johanna B. Djurhuus |

1. **<u>102-78-2023: Skriv frá Gunnhild Mortensen viðv. bygdarráðssessinum</u>.**
   Gunnhild Mortensen søkir um farloyvi frá kommunustýrinum frá 1. oktober at rokna.
   Næsti maður á listanum er Sten Spange Larsen, ið hevur boðað frá, at hann ikki kann røkja sess í bygdarráðnum, tí hann arbeiðir norðanfjørðs. Aftaná Sten er Poul Laust Christiansen næstur á listanum og hevur hann játtað at taka sæti í bygdarráðnum, meðan Gunnhild Mortensen hevur farloyvi.
   **Fíggjarnevndin 23.10.2023:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til at játta Gunnhild Mortensen farloyvi frá bygdarráðnum.
   **<u>Avgerð</u>:**
   Einmælt samtykt at játta Gunnhild Mortensen farloyvi og at Poul Laust Christiansen tekur sæti í bygdarráðnum fyri hana.

2. **<u>102-73-2023: Umsókn um stuðul frá Suðuroyar Norðara Bjargingarfelag</u>.**
   Søkt verður um stuðul til rakstur av virksemi felagsins.
   **Fíggjarnevndin 23.10.2023:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til at stuðla við kr. 50.000,00.
   **<u>Avgerð</u>:**
   Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

3. **<u>102-72-2023: Umsókn um stuðul til kappingarárið 2024 frá bóltfelagnum ROYN</u>.**
   Søkt verður um fíggjarligan stuðul til felagið fyri 2024, eins og spurt verður, um kommunan vil stuðla við at lata grót til verkætlanina við nýggjum graslíkisvølli og somuleiðis fíggjarligan stuðul.
   **Trivnaðarnevndin 17.10.2023:**
   Nevndin mælir til at játta ROYN grót til nýggja vøllin, sum er tøkt í grótbrotinum Suðuri í Haga, umframt fíggjarligan stuðul fyri 2024 á kr. 125.000,00. Nevndin mælir til ikki at seta nýggju verk-

ætlanina til vøllin á fíggjarætlanina hjá kommununi. Nevndin ynskir at fáa eina nágreiniliga kostnaðarmeting av arbeiðinum, áðrenn verkætlanin kann koma á fíggjarætlan hjá kommununi.
**Fíggjarnevndin 23.10.2023:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at stuðla bóltfelagnum ROYN við kr. 125.000,00 í 2024. Málið viðvíkjandi gróti til vøllin v.m., verður støða tikin til seinni, tá staðfest er, hvussu stór nøgd av gróti er tøk í grótbrotinum.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at stuðla ROYN við kr. 125.000,00 í 2024. Somuleiðis varð samtykt at fáa eina uppgerð yvir nøgd av gróti, ið er tøkt í grótbrotinum, áðrenn støða verður tikin til hetta.

4. **102-77-2023: Umsókn um stuðul frá Bygdarfelagnum á Rananum.**
Søkt verður um stuðul til nýggja hitaskipan til Ranhøll.
**Fíggjarnevndin 23.10.2023:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at stuðla felagnum við kr. 20.000,00, ið eru oyramerktar til hetta arbeiðið. Stuðulin verður goldin, tá rokning fyri gjørt arbeiði fyriliggur.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

5. **102-79-2023: Umsókn um sundurbýti millum matr.nr. 147f og 219c, Hvalba.**
Søkt verður um sundurbýti, har matr.nr. 147f letur umleið 140 m2 til matr.nr. 219c, Hvalba.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini um sundurbýti.

6. **102-80-2023: Umsókn um sundurbýti av matr.nr. 319, Hvalba.**
Søkt verður um sundurbýti av matr.nr. 319, har trý neyst standa á ognini.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini um sundurbýti og geva frávik í mun til støddina.

7. **102-81-2023: Tilboð uppá skelti/búmerki til Hvalbiar skúla.**
Innkomnu tilboðini eru frá Innspark og Sendi/Dekostovuni.
**Trivnaðarnevndin 17.10.2023:**
Nevndin mælir til at taka av tilboðnum frá Sendi/Dekostovuni og at kommunan sjálv setir skeltið/búmerkið upp.
**Fíggjarnevndin 23.10.2023:**
Einmælt samtykt at mæla til at taka av tilboðnum frá Sendi/Dekostovuni uttan uppseting, tí nevndin dámdi betri hetta skeltið/búmerkið.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

8. **102-84-2023: Innkomið tilboð uppá liðugtgerð av skrásetingum.**

Tilboð uppá liðugtgerð av skrásetingum (rottangar/samlibrunnar, oljutangar, vatnleiðingar).

**Fíggjarnevndin 23.10.2023:**

Samtykt varð einmælt at útseta málið.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt at beina málið aftur í Teknisku nevnd.

9. **102-83-2023: Innkomin tilboð frá Sp/f Munin uppá víðkan av skrásetingarskipanum.**

Tilboð uppá ymiskar røktarskipanir og uppgávustýring.

**Fíggjarnevndin 23.10.2023:**

Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av tilboðnum frá Sp/f Munin.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá nevndini.

10. **102-85-2023: Fíggjarætlan 2024 – 1. viðgerð.**

Rakstrarútreiðslurnar eru mettar til kr. 35.802.000,00, íroknað útreiðslur til eldrasamstarvið BHS kr. 10.128.000,00 og afturgjald av skuld kr. 3.000.000,00.

Inntøkurnar eru mettar til kr. 35.328.000,00, harav inntøkan frá eftirlønargjøldum, DIS og FAS er kr. 10.128.000,00 sambært meting frá FMR.

**Fíggjarnevndin 23.10.2023:**

Samtykt varð einmælt at mæla til, at skattaprosentið verður broytt úr 20,6% til 20,4% og barna-frádrátturin verður óbroyttur kr. 6.500,00.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

11. **Ikki almenn mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.00

Janus Thomsen Niels Olaf Eyvindsson Martin í Nesi

Thorstein Thomsen Poul Laust Christiansen